**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1422**
**Tíðarskeið 4/6 - 11/6-2014**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Karin Margretha H. Larsen, Bogi Hansen og Inga Kristiansen, umframt Fabien Bonitz frá Universitetinum í Bergen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar og at leggja fortoyingar út. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av NACLIM verkætlanini.

**Reiðskapur:** Streymmátarar og útgerð at taka upp og leggja út við. CTD-in og WP2 glúpur. Útgerð at dreggja eftir rammu við. Multi-plankton glúpur. Kúpuskelja-dregg hjá Universitetinum í Bergen.

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 5/6 kl. 1500. Siglt varð norðurum, har ramman NWNA bleiv løgd út. Síðan varð stimað norður á standardstøð N04, har Inga tók CTD og glúp. Næsta støð var at leggja boyuna NWNB út og síðan var aftur ein støð hjá Ingu á N05 tikin. Her gekk ikki heilt eftir vild, tí vit róku skjótt suðureftir inn móti hellingini, so glúpurin kundi ikki fara so langt út, sum ætlað, og tá glúpurin kom inn var tað eina netið skrædnað eitt sindur. Meðan glúpurin bleiv seymaður aftur løgdu vit boyu NWNG út stutt norðan fyri N05. Síðani sigldu vit suðuraftur og tóku glúpin umaftur. Hetta var liðugt kl 08 fríggjamorgun 6/6 og síðan var siglt norður á N13 og N14. Her blivu CTD og glúpur tikin eftir ætlan. Vit vóru liðug kl 23 og sigldu síðan á Havnina, hagar vit komu kl 1330 leygardagin 7/6.

Á Havnini fór Inga í land og vit riggaðu eisini tað næstu rammuna til, meðan vit lógu har. Vit fóru av aftur Havnini kl 1445 og sigldu móti standardskurði S í Hetlandsrennuni. Vit komu á fyrstu støð kl 19 og tóku skurðin suðureftir. Tær fyrstu 10 støðirnar eru óbroyttar, meðan tær næstu sjey, sum eru í bretskum sjógvi, eru nakað sunnan fyri tær gomlu støðirnar. Tá vit nærkaðust skotska landgrunninum gryntist skjótari enn okkum var sagt, og tískil tóku vit ikki ta innastu støðina. Siglt var nú norður aftur á positiónina hjá rammu NWSH, har hon var løgd út í øllum góðum, tó at dýpið her eisini var grynri enn ætlað. Síðan var siglt norður á NWSC mitt í rennuni, og har var ein boya løgd út. Nú var liðugt í Hetlandsrennuni og hvítusunnudag kl 17 settu vit kós móti Bankarennuni.

Annan hvítusunnudag kl 04 vóru vit í Bankarennuni og har løgdu vit boyurnar NWFC og NWFB út. Síðan sigldu vit á eina positión stutt innan fyri aldumátaran hjá Landsverk vestanfyri. Har fóru vit at dreggja eftir kúpuskel fyri Fabian. Fyrsta dreggi gekk væl, men í tveimum teimum næstu var minni í og botnurin var eisini blivin harðari, so at dreggi fór eitt sindur av hesum. Vit stimaðu tí eitt sindur longri inn og tóku tvær dreggistøðir har, men góvust so á hesi leið.

Nú sigldu vit á positiónina hjá lítlu rammu og royndu enn eina ferð at dreggja eftir henni. Hesaferð sigldu vit runt um positiónina, men tað einasta vit fingu á dreggi var gamal weirur. Tískil góvust vit við hesum kl 1325 og sigldu eysturum Nólsoy, har vit eisini skuldu dreggja eftir kúpuskel.

Vit komu eysturum kl 16 og tóku tilsaman sjey dreggistøðir á trimum positiónum. Her gekk væl og nógv var í á øllum støðum. Fabian tók alt tað vit funnu av bæði livandi og deyðum kúpuskeljum. Annars var mest av jákupskel. Vit vóru liðug annan hvítusunnudag kl 1830 og sigldu síðan á Havnina, hagar vit komu kl 2045.

Alt gekk væl og alt riggaði, sum tað skuldi á túrinum. Veðrið var av tí besta allar dagarnar.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 20 støðir og saltprøvar á teimum flestu støðunum. Við WP2 glúpinum tóku vit 16 + 4 støðir og við multiglúpinum 4 støðir. Prøvar til pH og CO2 blivu tiknir á 3 støðum. Tilsaman 12 skeljadregg vórðu tikin og kúpuskeljaprøvar tiknir á øllum teirra.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst og hinir prøvarnir í summar.

**Viðmerkingar:** Ongar

11-06-2014

Karin Margretha H. Larsen




Kósir og støðir á túri 1422